# Skaðafrøðingur søkist

## TRYGD leitar eftir skaðaviðgera

**STARVIÐ**
Talan er um spennandi starv, har høvuðsuppgáva tín verður at standa fyri skaðaviðgerð, frá fráboðan til útgjald. Tú fert at standa fyri skaðaviðgerð av ábyrgdarskaðum og kaskoskaðum á privatakførum og vinnuakførum, umframt at tú fert at hava um hendi skaðaviðgerð av leysafæi og bygningsskaðum á bæði privatøkinum og vinnuøkinum.

Tað er sera umráðandi, at tú hevur førleika at veita kundanum eina góða tænastu í skaðaviðgerðini, og at tú samstundis tryggjar honum tað endurgjald, ið hann hevur rætt til.

**TÚ**
Tú hevur nøktandi útbúgving til starvið og hevur helst fleiri ára royndir á viðkomandi øki. Tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt, men tú trívist somuleiðis í toymum. Tú hevur eisini yvirlit og megnar at hava nógvar bóltar í luftini samstundis. Tú tekur ábyrgd, dugir væl at raðfesta og at arbeiða saman við øðrum, umframt at tú hevur ein fínan sans fyri handilslívi.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Finansforbundet. Tú fært eina góða, fasta løn. Vit vilja seta starvið sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Skrivlig umsókn við curriculum vitae og viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi innan 1. juli 2007. Send umsóknina til P/F TRYGD, att.: Ella Mortensen, Gongin 7, Postboks 44, 110 Tórshavn, ella til elm@trygd.fo.

**LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO**
**UMSÓKNARFREIST ER 1. JULI 2007**

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 35 fólk, og vit umseta fyri meira enn 75 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

**TRYGD**
leitar eftir tær.

---

**stuðulsfólkaskipanin fyri børn**
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi, ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast í løtuni gott 100 fólk.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

**Sóknast verður eftir**
## STUÐULSFÓLKUM TIL VÁGA, STREYMOYAR OG EYSTUROYAR ØKI

Arbeiðstíðin kann vera skiftandi, og tey ið sett verða mugu tola broytingar í starvinum. Talan kann eisini vera um samansettar uppgávur. Talan er um fleiri stuðulsuppgávur, við ymiskum tímatali. Tímatalið verður tí eftir avtalu.

Søkt verður eftir fólkum við viðkomandi náms- og heilsufrøðisligum útbúgvingum, sum til dømis námsfrøðingum, ergo- og fysioterapeutum, heilsustøðingum og sjúkrarøktarfrøðingum. Eisini verður søkt eftir dugnaligum hjálparfólkum.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum fíggjamálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er 25. juni 2007.

Skrivlig umókn, prógv og viðmæli skulu sendast til: Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Almannastovan, Tinghúsvegur 14, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Joan Olsen, ella Ragnhild Dahl, stuðulsráðgevar, tel 35 35 70.

---

**MIÐFLOKKURIN**

*hvørt vikuskifti í Sosialinum*

- *Altjóða sinnaður*
- *Fjølbroyttur*
- *Greiður*
- *Jaligur*
- *Sterkur*

**MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI**



Jan Højgaard

## Profilurin

**Navn:** Jan Højgaard
**Bústaður:** Toftir
**Giftur við:** May í Túni Højgaard
**Starv:** Formaður í Føroya Fiskimannafelag

Eftir at hava roynt baldruta sjólívið í mong ár, hevur Jan nógvar royndir at taka av, nú hann hevur sett seg í formanssessin í Fiskimannafelagnum. »Eitt av mínum hjartamálum, er at fáa til vega eina virðiliga eftirløn til fiskimenn okkara. Hóast fiskimenn í áravís hava stríðst dagliga í 18-20 tímar, og hava lagt grundina undir vælferðasamfelagnum, hava uppilagstir fiskimenn lítla eftirløn at liva av.«

»Tað er sera harmiligt at síggja, at munur verður gjørdur á fólki, alt eftir hvørji tey, ella teirra foreldur eru. Mær leingist eftir at síggja Føroyar meir tryggar fyri øll, har ongin dettur niður í millum.«

»Politikkur Miðfloksins snýr seg um næstrakærleika, tí skarar hann framúr. Hann hevur umsorgan fyri tí veika og minni menta. Hetta meti eg vera sera týdningarmikið - og tí stuðli eg Miðflokkinum.«

**Visti tú at:**

- 2.500 limir eru í Føroya Fiskimannafelag.
- Fyrstu fýra mánaðirnar í ár eru 7.000 tons færri avreidd, í mun til sama tíðarskeiðið í fjør.
- Almenni roykipolitikkurin ikki røkkur til sjómannin, og at nógvir ungir dreingir byrja at royka umborð á skipi. Hesin trupulleikin fylgir teimum flestu restina av lívinum."
- Í 2004 taldi fiskaútflutningurin 82% av øllum útflutningi, av bæði vørum og tænastum samanlagt.
- Útflutningurin av fiskavørum í 2005 var slakar 3,4 miljardir krónur.

www.midflokkurin.fo